# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Kreppan í Zimbabwe er ring og nógv verri, enn vit nakrantíð høvdu kunnað ímyndað okkum*

*(Jimmy Carter)*

# Veksandi rasuhatur í USA aftan á sigurin hjá Obama

**Í USA er ágangurin ímóti minnimutum vaksin, síðani Barrack Obama vann forsetavalið**

Tað eru tøl hjá borgararætti ndafelagsskapum, sum sambært tíðindastovunum vísa, at kriminelli ágangurin ímóti minnilutum er vaksin síðani forsetavalið.

Millum annað hava felagsskapirnir skrásett fleiri hundrað tilburðir av likamligum ágangi og niðran, sum tykjast hava sín uppruna í rasuhatri. Felagsskapurin Southern Poverty Law Centersigur tó, at enn ber ikki til at siga, at talan er um veruligan harðskap.

Eitt annað, sum er hent síðani valið tann 4. november, er, at felagsskapir sum Ku Klux Klan og the Council of Conervative Citizens hava fingið munandi fleiri fyrispurningar um limaskap, síðani USA valdi sín fyrsta litta forseta.

- Teir víðgongdu høgrafelagsskapirnir hava eisini góðar dagar, nú arbeiðsloysið veksur orsakað av teirri stóru fíggjarkreppuni, samstundis sum framskrivingar vísa, at tey hvítu vera í minniluta í USA miðskeiðis í hesari øldini, sigur Southern Poverty Law Center í einari viðmerking til gongdina tær seinastu vikurnar.

Fyri stutum varð ein 17 ára gamal drongur dømdur fyri at hava stungið ein ungan mann úr Ekvador so meint, at hann doyði. Seks aðrir unglingar eru tiknir í sambandi við drápið, men allir nokta seg sekar. Í einum øðrum føri fann eitt húski í New Jersey ein brendan kross í urtagarðinum um nakrar fáar dagar eftir forsetavalið. Tey høvdu valt Obama.



*Víðgongdir felagsskapir sum Ku Klux Klan hava fingið fleiri nýggjar limir, síðani Barrack Obama vann forsetavalið 4. november*
*Mynd: AP*



*Barrack Obama. Allir amerikanarar eru ikki líka fegnir um valsigur hansara*
*Mynd: AP*

# USA missir støðu sína sum risastórveldi

**Tíðin hjá USA sum stórveldi í serflokki er farin at styttast, sigur amerikanska fregnartænastan, sum sigur, at í komandi tíðum má USA lurta eftir Kina og India**

Tey seinnu árini hevur USA stýrt heiminum, tí landið hevur verið í serflokki búskaparliga og hernaðarliga samanborið við hin partin av heiminum. USA fer framvegis at hava eina oddastøðu, men tíðin sum heimsins einasta risastórveldi er farin at styttast.

Tað er niðurstøðan hjá greinarunum hjá stovninum National Intelligence Council, sum umboðar allar tær 16 amerikonsku fregnartænasturnar. Eitt nú siga greinararnir hjá NIC, at hernaðarliga fer munurin millum USA og einstøk onnur lond at minka.

Frágreiðingin hjá NIC er ein meting av, hvat fer at henda hetta til 2025, og greinararnir eru á einum máli um, nat serstakliga Kina og India fara at gera vart við seg millum tey allarfremstu, hóast tey neyvan fara at taka seg fram um USA.

NIC-greinararnir siga, at bæði Kina og India hava stórar búskaparligar og sosialar avbjóðingar fyri framman. Tað ger, at bæði londini noyðast at leggja høvuðsdentin á innanhýsis viðurskifti, og at virðisøkingin fyri hvønn íbúgva framhaldandi verður minni enn í Vesturheiminum.

Amerikonsku fregnartænasturnar siga, at teir fremstu luttakararnir á altjóða pallinum tey næstu 15 árini vera USA, Kina, India, Russland, ES og Japan. Men nøkur onnur lond fara væntandi eisini at gera vart við seg, og greinararnir nevna lond sum Brasil, Iran, Turkaland og Indonesia.




*USA hevur verið oddaland takkað verði búskaparligu og hernaðarligu megini, men í komandi árum fer munurin millum USA og lond sum India at minka - bæði búskaparliga og hernaðarliga*
*Mynd: AFP*

## STUTT SAGT

### Sveisarar og íslendingar mótmæla

Tað er ikki bara í Reykjavík, at fólk ganga mótmælisgongu og krevja, at fíggjarkreppan skal fáa avleiðingar fyri millum annað ta politisku leiðsluna í landinum.

Í Sveis ganga fólk eisini mótmælisgongu. Har eru tey í øðini um, at tað almenna hevur hjálpt bankanum USB við meiri enn 70 milliónum sveisiskum frankum. Nógvir sveisarar halda, at bankin liggur, sum hann hevur reitt, og at tað er ikki uppgávan hjá skattaborgarunum at hjálpa honum.

Um vikuskiftið vóru næstan 4.000 fólk í gøtunum og mótmæltu, at USB-bankin fær almenna hjálp. Í hesum viðfangi høvdu fleiri fingið sær skelti við bókstavunum USB, men sum í teirra hugaheimi var ein stytting fyri „United Bandits of Swiss".

### Hvítarussland noyðist við í kappdubbing

Forsetin í Hvítarusslandi, Alexander Lukasjenko, sigur, at avgerðin hjá NATO at styrkja sínar herdeildir í Evropa fer at elva til eina nýggja vápnakappdubbing í okkara heimsparti.

Við fronsku tíðindastovuna AFP sigur Lukasjenko, at hvítarussiska stjórnin fylgir væl við tí, sum NATO tekst við í Eysturevropa. Hann vísir millum annað á, at NATO-flogfør flúgva altsamt nærri tí hvítarussiska markinum og spyr, hví tey gera tað.

Sambært forsetanum hevur Hvítarussland ikki annað í at velja enn at styrkja sína loftverju, og tað er ein beinleiðis avleiðing av teirri herdu vápnadubbingini hjá NATO, sigur hann.

Viktor Lukasjenko sigur, at Hvítarussland noyðist eisini at takað til eftirtektar, at NATO-herdeildir eru í Baltalondunum, og at landið má takað stig samsvarandi hesum veruleika.